# Frágreiðing frá løgmanni 1988

Eins og undanfarnar, setti sitandi samgonga sær arbeiðssetning við samráðingarnar um skipan av landsstýri, og nú valskeiðið er nærum runnið, kann ásannast, at sjáldan er so stórur partur av einum samgonguskjali vorðin veruleiki sum hesaferð.

Havandi sera truplu búskaparviðurskiftini, ið valdaðu við ársskiftið 1984/85, í huga, og sera viðbreknu fíggjarviðurskiftini í okkara vinnulívi, er tað merkisvert, at so stórur partur av eini politiskari stevnu kundi innast í verki.

Hinvegin eru eisini týðandi mál, sum ikki eru rokkin, og ímillum hesi einstøk, sum skuldu givið okkum betri møguleika at samskipa alla íløgustýring og forða fyri, at tiltøk, sum eru sett í verk heildini at frama, verða undirgingin av einstaklingum og felagsskapum, sum misnýta skipanirnar og harvið innanhola ikki bert hesar, men allan samfelagsbúskapin.

Sum ofta nevnt er føroyski kapitalmarknaðurin sera opin, og so leingi kreditvirði føroyinga er so stórt, at ikki stendur á at útvega fígging uttanífrá, so leingi er torført at avmarka samlaða íløguvirksemið, serliga so leingi neyðuga samskipanin av virkseminum hjá bankum, fíggjarstovnum, privatum, kommunum og landi ikki er undir eftirliti landsbankans.

Hesin er júst farin at virka, og fyribils eru tekin um, at partarnir líta fram til eina samvinnu í samráðingum, og eiga vit at lata hesar standa sína roynd.

At hesar kanska fara at hepnast, eru størri vónir um, nú nærum allir partar eru samdir um, at virksemið er ov stórt, og at tær *ov stóru íløgurnar eru høvuðstrupulleikin í føroyskum búskapi í dag.*

Hesin trupulleikin er kortini ikki størri enn, at ein avmarking við einum 300 milliónum setti okkum í eina javnvágsstøðu.

Ongin orsøk er at dylja, at tær íløgur, ynski er um komandi 5-6 árini, mugu og skulu javnast út yvir 8-10 ár, soleiðis sum gongdin í framleiðsluvirðinum hevur verið í 1987 og 1988.

Henda meting kann broytast, um so verður, at væntaða økingin í framleiðsluvirði kortini fer at sýna seg komandi 2-3 árini, og okkurt bendir á, at so verður, men við teim bakkastum, vit hava fingið nú trý ár á rað í framleiðsluvinnuni, har útflutningurin bert veksur einar 50-100 mill. kr. árliga, meðan innflutningurin veksur einar 200 mill. kr. árliga, og íløgulán framvegis liggja óvanliga høgt, er niðurstøðan, at íløgurnar skulu tálmast nakað, og sum eg skal nerta við seinni, eru vit í teirri hepnu støðu, at hetta væl letur seg gera.

Gjaldsjavnahallið í 1988 er framroknað at gerast góðar 700 mill. kr., og kemur uttanlandsskuldin við árslok at liggja um 4600 milliónir. Hon veksur sostatt í fýra ár við 1500 mill. kr., og er hetta meira enn samgongan hevði vónað, men kortini einar 1000-1500 mill. kr. minni enn roknað varð við í 1984.

Vøruinnflutningurin í 1988 er mettur at blíva umleið 3355 mill. kr. — harav skip og flogfør fyri 555 mill. kr., og útflutningurin av vørum verður 2185 , harav skip 175 mill. kr. Hartil koma so útfluttar tænastur fyri 420 mill. kr.

Orsøkirnar, til at útflutningurin ikki veksur meira enn einar 75 milliónir í mun til 1987, eru fleiri og í summum førum aðrar enn tær, sum ávirkaðu útflutningin í 1985/86/87. Fiskaloysið eystanfyri og eitt ávíst prísfall á saltfiski merkir, at 3000 tons færri eru útflutt og virðið minkað 75 milliónir.

Frystiframleiðslan er í nøgd og virði nærum hin sama sum árið fyri, hóast prisfall nú í nakrar mánaðir.

Ídnaðarfiskur og framleiðslur úr ídnaðarfiski eru vaksin og vaksa munandi út á árið bæði í nøgd og virði. Higartil er nøgdin vaksin so mikið, at samlaða tonsatalið útflutt fyrsta hálvár er 130.000 mótvegis 107.000 fyrra hálvár 1987.

Rækjuútflutningurin er øktur við 1800 tonsum og 70 mill. kr. Heri liggur prisvøkstur uppá 5%, og nøgdarvøkstur serliga stavandi frá Kanada-loyvunum.

Hinvegin hevur alivinnuni verið bakkast fyri, og er tí ein væntaður útflutningsvøkstur uppá 300 og 400 mió. kr. skotin fram ávikavist í 1989 og 1990. Orsøkin er furunkolosufellið og annað felli í 1986.

Alivinnan er vinna, har goymsluuppbyggingin er serliga peningakrevjandi. Innflutt er í 1988 fyri einar 90 mill. kr. í fóðri, og er hesin innflutningur sterkt økjandi, væntuliga við 30-40% árliga.

Hesar goymslur saman við teim sera stóru fiskagoymslum, vit hava í løtuni vegna trekan marknað og lágan prís, benda á, at undir vanligum viðurskiftum og meðal troytan av tilgongiligum kvotum, skuldi útflutningur okkara ligið einar 5-600 milliónir hægri og gjaldsjavnahallið verið burtur.

Um so var, kundu vit endurskoðað íløgurnar og bert avmarkað í mun til tað, ið ovurvirksemið og tørvurin á arbeiðsmegi tilskilar.

Men hóast tað er rættiliga vist, at støðan batnar út á heystið og komandi ár, millum annað tí at proteinframleiðslan í heiminum er minkað, so er nevndi vøkstur enn fuglur á tekjuni, og stendur fyribilsniðurstøðan omanfyri til við:

*Vit skulu og mugu toyggja samtyktu og ynsktu íløgurnar út yvir 8 til 10 ár heldur enn 5 til 6 ár.*

## Ymiskt úr búskapartølunum

Innflutningshagtølini siga, at framvegis er vøkstur í tilfarsnýtsluni til byggivirksemi, serliga til bygningar heili 20%, meðan onnur framleiðsla liggur í fastari legu.

Maskinur og kapitalútgerð vaksa, tí SEV fær ein stóran motor, men annars minkar hesin innflutningur, sum hevur verið sera stórur.

Bilkeypini tykjast fækka, tí her er minkingin 30%, meðan lastbilar framvegis verða innfluttir í stórum tali.

Vørur til vanliga nýtslu, sum undanfarin ár eru vaksnar lítið — sum eisini ætlanin var við nýtsluavmarkandi tiltøkunum í 1986 — vaksa nú aftur við heilum 9%. Tað tykist, sum stóri lønarvøksturin í 1987 og 88 økir rættiliga um nýtsluna aftur.

Hesin lønarvøkstur er samanlagt 17% í mun til sama tíðarskeið í fjør. Partvís er hetta ávirkað av verkfallinum í mei 1987, og helst er eisini talan um ávísa longliðing. Kortini er tað óvanligt, at samlaða lønútgjaldingin fyrra hálvár er størri enn seinna hálvár árið fyri, tí vanliga økist samlaða útgjaldingin frá fyrru helvt til seinnu helvt av árinum.

Í tekniskum umvælingum og smiði er lítil lønarvøkstur — 3% — meðan bygging, orku- og vatnveiting, flutningur og aling sýna vøkstur 25-30%.

Fiskatilvirkingin, sum hevði afturgongd í 1987, er í lønútgjalding vaksin aftur við 8%'um.

Dýrtiðin — inflatiónin — hevur seinasta árið verið 3-4%, so lønarvøksturin merkir stóra reallønarhækking, men fyrst og fremst stórt virksemi, soleiðis at tann linkingin, vit hildu okkum kenna í 1987, er burturi og virksemið aftur farið at vaksa.

## Almenna fíggjarstøðan

Samgongan setti sær í 1985 fyri at reka ein meira avmarkandi og konsoliderandi fíggjarpolitikk, enn verið hevði. Mett varð neyðugt at tálma nýtsluni og útvega fíggjarlógunum avlop, so m.a. teir mongu grunnar, sum vóru í afturhond, kundu styrkjast, og leggjast kundi upp fyri til útgjalding av nógvum veðhaldsmilliónum, sum vóru í vanda.

Landskassahallið uppá 60 mill. kr. í 1984/85 minkaði stutta fíggjarárið 1985 til 22 mill. kr. og gjørdist til avlop uppá 257 mill. kr. í 1986.

Við fyrivarni av, at endaliga skattaavrokningin fyri 1987 ikki fer fram fyrr enn í oktober 1988, sýna tølini í dag yvirskot fyri 1987 uppá 290 mill. kr. Harumframt eru 93 mill. kr. lagdar í oljugrunn.

Gongdin í toll- og skattainntøkum í 1988 bendir á, at landskassin kann greiða sínar skyldur hampiliga væl og kortini fáa eitt avlop.

Hesin politikkur hevur verið heppin, tí øllum kunnugt eru hesi árini útgoldnar hundraðtals milliónir fyri fallin veðhald, og vit vita, at eisini í 1988 og 1989 gerast stór veðhald effektiv..

Játtanirnar til veðhaldsgrunnin vóru sera smáar, og eru hesar tí øktar útvið 300 mill. kr. eyka. Íalt mugu verða útlagdar yvir 600 mill. kr. seinastu átta árini, harav stórur partur seinastu 2-3 árini, so eisini her kemur væl við, at lagt varð upp fyri, so hetta bleiv goldið.

Fiskivinnuni verða roknaðar góðar 100 mill. kr. eyka í hesum fíggjarári. Hetta kemur sjálvandi at ávirka roknskapin fyri 1988, men í hvønn mun vita vit ikki enn.

Sum fleiri ferðir ávíst er landskassin sera viðbrekin mótvegis spekulatión í rentuskattaskipanini. Búskaparfrøðingar tala meira og meira um tað órímiliga í, at tað ber til at læna til uppsparing. Tað hevur vundið nógv upp á seg at læna uttanlands til innsetan í føroyskar peningastovnar. Hetta minkar um møguleikan at lætta um hjá teim, ið noyðast at læna fyri t. d. at fáa tak yvir høvdið.

Ongin politikkari ynskir at gera tað tyngri at seta búgv. Ongin politikkari ynskir at tyngja um hjá familjum, sum noyðast at bera lán. Ongin politikkari ynskir at skerja uppsparing, men vil framvegis stuðla og »premiera« slíka.

Tí er spell, at vit ikki í felag kunnu burturbeina hesa dupultspekulatión og varðveita fyrimunirnar.

Vónandi kann komandi løgting typpa hetta rentuhol, sum nú fleiri og fleiri smoykja seg ígjøgnum fyri at skulka undan samfelagsskyldum. Skyldum, sum onnur mugu rinda í skatti og tolli.

## Avmarkingar — Raðfestingar

Sum eg nevndi, kann ein minking í samlaða íløguvirkseminum uppá einar 300 milliónir veita okkum betri búskaparjavnvág.

Vit eru í teirri hepnu støðu enn, at hóast beinleiðis nýtslan er vaksin nakað, so er hesin vøkstur munandi minni enn í grannalondum okkara, og íløguparturin av samlaðu bruttotjóðarúrtøkuni er so nógv størri hjá okkum. Vit kunnu tí minka henda part uttan, at tað, sum í grannalondunum, fær arbeiðsloysi sum avleiðing.

Men í hesi raðfesting — prioritering — fyri komandi 8-10 árini, er neyðugt at hava vinnulívsíløgurnar fremri enn aðrar, so neyðug útskifting av vinnutólum kann fremjast, og ávísum samskiftiíløgum sleppst heldur ikki undan, tí hesar vaksa um landið, varðveita búsetingarmøguleikar og eru fortreyt fyri vinnuvirksemi. Tað er sum so ofta sagt framleiðsla saman við ávísum afturhaldi, sum kann loysa okkum úr fíggjarligum høftum.

Talað verður nógv um ov stórar skipaíløgur, og hava hesar verið stórar, men við tí politikki, nú er lagdur, fara tær at minka. Skip mugu út, koma skip inn, og á Føroyaleiðunum kann hetta einans lata seg gera, verður samstundis framdur niðurskurður í veiðiorku.

Minkaði stuðulin til skipabygging og veruleikin, at framyvir verða einans 5% latin í veðhaldi saman við útvegaðum síðustillaðum bankaveðhaldi uppá 5%, vil væntuliga geva okkum frægastu projektini, sum so aftur skulu metast nágreiniliga av sáttmálastovninum.

Krøvini, til hvat roknast kann sum eginpeningur, ið eginpeningsnevndin setti fyrra árið, vilja eisini ávirka sítt, so samanumtikið er samtykt munandi afturhald á hesum øki.

Fiskiskip eru tó lívsgrundarlagið, og mugu vit ansa eftir ikki at skerja íløguhugin so nógv, at ikki nýroyndir verða framdar. Tær eiga lívið í okkum, eisini tær vágiligu og lutvíst mishepnaðu.

Havnaætlanin er 8-ára ætlan, og má so ansast eftir, at byggingarnar ikki verða framdar skjótari.

Sjúkrahúsbyggingin er ætlað framd yvir 7 ár, og skúlabyggingin eitt líknandi áramál.

Tað verða so aðrar almennar kommunalar og privatar útbyggingar, sum eisini mugu byggjast. Vónandi kunnu peningastovnarnir medvirka til at ávirka hetta yvir lánveitingarnar.

## Fiskivinna — Veiðumøguleikar

Við árslok 1987 vóru vit rættiliga bjartskygd um góða Noregs/Sovjetsáttmálan, tí kvoturnar vóru nógv vaksnar og stovnsmetingarnar góðar.

Væntaðu tí eisini, at feskfiskaflotin fekk burturúr hesi øking, og veiddu feskfiskatrolararnir eisini fyrst í árinum útvið 3000 tons eystanfyri. Fiskiskapurin minkaði tó burtur í einki, og er hetta eitt álvarsligt afturstig fyri saltfiska/flakatrolararnar.

Á Flemish Cap er ongin veiða í ár, og hava saltfiskalínuskipini tí stórar trupulleikar. Eisini frystilínubátarnir hava drigið ov lítið fyrra hálvár, men nú svartkalvatíðin er byrjað, sær frægari út.

Laksaveiðan innan 200 fjórðinga markið sveik heilt, og hesi skip leita nú eftir øðrum møguleikum. Talað verður um at royna eftir tunfiski og øðrum virðismiklum fiski á víðum havi. Landsstýrið stuðlar slíkari roynd.

Føroyaleiðirnar hava sum nevnt roynst eins drúgvar og seinasta ár, og nóta- og ídnaðarflotin átti við verandi prísum at fingið eitt hampiligt ár.

Men í svartkjaftavinnuni, sum vit høvdu góðar vónir um á ólavsøku í fjør í samband við, at skræðuleyst beinfrítt flak kundi framleiðast og seljast fyri góðan prís, eru vónirnar fjaraðar munandi, og tungt tykist verða at koma víðari, nú tvey skip eru løgd vegna fíggjartrupulleikar.

Rakstrartølini fyri 1987 sýna fyri flestu skipabólkar frægari úrslit enn árini fyri og hetta hóast lakari veiðu á Føroyaleiðunum, og tær umsóknir um serlán, ið innkomnar eru, prógva eisini, at ikki stendur so illa til í vinnuni, sum summir prestar prædika.

Tað eru politikkarar og bløð, sum hava tikið sær rættin til at áseta — ella definera — at fiskivinnan er — Føroyar eru — í eini djúptgangandi kreppu, ja djýpri enn nakrantíð fyrr.

Henda rættin eiga teir ikki og fáa hann heldur ikki, og hartil er slík tala heilt burturvið.

Eins burturvið sum trúttanin um, at ávísir samgonguflokkar ganga við duldum ætlanum um at sosialisera allan veiðuflotan, øll framleiðsluvirkini og alla fiskasølu, bert soleiðis fyri »sportsins skuld« — sum tikið verður til.

So grunnum politiskum tjaki ber ikki til at luttaka í.

Vit áseta onga kreppu og viðganga heldur ikki, at ynski er um at jarðleggja vinnulivið, svølta fiskiflotan ella skapa húsagang.

Men vit dylja heldur ongar trupulleikar, dylja ikki tey tiltøk, eitt ábyrgdarstýri noyðist at seta í verk.

Tær skipanir, samtyktar eru fyri at minka um veiðutrýstið á Føroyaleiðunum, mugu t. d. fremjast, hóast tað kenst sárt hjá onkrum,her er hugsað um økta meskavídd, størri minsta mark, ásett fiskidagatal, avmarkað loyvi til Føroyaøkið o. s. fr.

## Neyðugar nýskipanir

Tað skerst ikki burtur, at okkara sølulið hevur avgerandi ávirkan á framleiðsluval og marknaðarval, og harvið aftur á hvørji fiskasløg høvuðsdenturin verður lagdur á.

Denturin hevur verið lagdur á at selja rávørur til ídnaðin hjá øðrum, heldur enn meira viðgjørda og góðskaða vøru. Hetta er kanska skiljandi, tí tungt er at bróta upp úr nýggjum·og tungt at koma inn á vardar marknaðir, men valið kemur okkum aftur um brekku, tí nú mugu vit ígjøgnum eina tunga umskipan.

Tað stendur í dag greitt, at flakavinna, ríkin so sum verið hevur, ongi lívilíkindi eigur. Hon hevur kunnað verið hildin uppi við støðugt økjandi studulsveitingum og umfordeilingum, men einaferð steðgar hetta, tí onga staðni slepst eftir meir studningi.

Vit mugu aftur í eina støðu, har tað, sum krevst til renting og og avdrátt av vinnutólum umframt lønir og kapitaltilvøkstur, fæst inn uttanifrá.

Tí er ein politikkur, har allir partar í meira mun enn nú, har veiðuliðið er »harmonika« í skipanini, merkja hvønn veg tað ber, so allir partar kunnu leggja seg í sela til tess at broyta gongdina.

Avmarkingarnar noyða okkum at veiða nærum øll fiskasløg, eisini tey bíligaru. Samfelagið hevur tí rindað fyri at steingja partar av flotanum burturi frá virðismiklari fiskasløgum, men eisini tey má virkast fyri at fáa meira fyri uttanlands. Tá tað t. d. ber til hjá íslendingum at fáa so munandi meira fyri kongafisk, enn vit fáa, so má broyting henda.

Nevndi, at tungt hevur verið at fingið svartkjaftavinnuna at mala, men kortini hava vit ikki ráð at sleppa endanum, hetta okkara størsta tilfeingi skal fáast at geva lønandi vinnu.

Tað almenna hevur skyldu til at stuðla dygg ilíga her, ikki fyri at statsstýra eini vinnu, sum onkur vil vera við, men tí so nógvir privatir eru útbløddir í hesi vinnu, sum hevur verið kanska hin liberalasta av øllum, tí so lítið hevur verið latið í studningi.

Tá skipini skuldu útvegast, vóru nógvir privatir um boðið, og teir, sum sluppu at fremja íløgur, kendu seg hepnar, men í dag er eins og áræðið er linkað, mátturin og peningaorkan ganga undan.

Tað eru ávísir veruleikar, sum siga okkum, at ikki ber til at sleppa endanum.

1. Vit koma at innflyta fyri hundraðir av milliónum í alifóðri komandi árini. Hetta kunnu vit eins væl framleiða sjálvi, megna vit at fáa til lands tey 15-25.000 tonsini av svartkjafti, sum hvørt skipið higartil hevur pumpað yvirborð aftur.

   Hertil krevjast serligar niðurkølingar- og goymsluskipanir.
2. Protein framleiðslan í heiminum er minkað.
3. Ætlanir um aling í fjareystri, Afrika, ja um allan heim eru so stórar, at ongantíð kann útvegast nóg mikið av fiski til fóður, og hann skal nú nýtast, tí hann hevur tey protein, feittsýrur og aminoevni, sum krevjast til gott fóður.
4. Framleiðslutøkni, sum vinnur á sandmaðka-trupulleikunum, finnst og kann útviklast t. d. »granulat frysting« og »extrudering« til lidnar vørur.

Men royndir og útvegan av kunnleika til framleiðslustýring kosta hópin av peningi, eins og tað kostar at gera seg meira óheftan á marknaðunum.

Eitt, sum dentur tí má leggjast á í raðfestingini av útbyggingini av okkara útbúgvingunun, er at laga skúla- og útbúgvingarskipanina so, at vit gerast kunnug við nýtslu av hátøknifrøði, so sum so mong onnur rávøruřátæk lond hava verið noydd at gera, t. d. Japan, Danmørk og Svøríki.

Skulu vit lættari sleppa fram at marknaðum fyri viðgjørdum vørum, er ein avtala við felagsmarknaðin um teirra »innara« marknað lívsneyðug.

Hon kann eftir landsstýrisins tykki ikki merkja limaskap, men kemur helst at krevja ávísar »harmoniseringar« — innan tolløki og burturbeining av verjutolli.

Tað er m. a. við hesum í huga, at landsstýrið hevur skipað serliga tollumsiting.

Innflutningsgjaldskipan okkara kemur helst eisini í vanda, tí øll onnur lond hava meirvirðisgjaldskipan. Tí er møguligt, at eitt nýtt løgting fær slíka at taka støðu til.

Nú okkara samfelag í stóran mun broytist soleiðis, at størri partur av samfelagorkuni verður nýttur í »sekundér«-vinnuni, vildi ein »momsskipan« kanska hóska betri enn verandi »omsskipan«, tí hon rakar ikki útflutningsvinnuna og tekur mest frá teim, sum brúka mest. Eisini slíkum, sum kunnu brúka, tí tey hava skákað sær undan skatti ella øðrum skyldum.

## Ídnaðarmál

Føroyskur ídnaður, handverk og tænastuvirksemi standa meira enn nakrantíð við eitt vegamót. Útlendska kappingin er hørð og tykist harðna.

Stór kapping er um arbeiðsmegina. Alt ov ofta fara fleiri undir somu framleiðslu, við tí úrsliti at trupult er hjá nøkrum at klára seg. Ofta verður ov lítið hugsað um sølu og marknaðarkanningar, áðrenn farið verður undir framleiðslu, og tað má tíverri sannast, at eginpeningurin ofta er í minna lagi.

Spekulatiónstíðirnar fara at hasa av, men føroyskur ídnaður, handverk og tænastuvirksemi mugu rokna við, at tey leingi koma at kenna avleiðingarnar av eini tíð við dýrum grundøkjum, høgum stovningarútreiðslum, dýrum og ótryggum tænastuveitingum, einum sum heild avskeplaðum lønarlagi og tvørrandi arbeiðsmegi. Tað kann vera ringt hjá føroyskum ídnaði, handverki og tænastuvirksemi at fóta sær í hesi støðu, men hetta er og verður neyðugt.

Skal virkjunum verða lív lagað, og skulu tey hava framgongd, so verður neyðugt hjá teimum at bøta munandi um arbeiðsumstøðurnar, soleiðis at talið á arbeiðsfólki verður minst møgulit, og at tey starvandi fáa góðar, tryggar og áhugaverdar arbeiðsumstøður, har teimum verður sýnt álit sum medávirkandi samstarvsfelagar. Virkini mugu rationalisera, effektivisera og í størst møguligan mun leggja seg eftir dygd og kunnleika í øllum liðum. Kapping kann vera góð, tí hon eggjar virkjunum til at mennast og eggjar teimum starvandi til nýhugsan.

Landsstýrið heldur tó, at tað í dag er stórur tørvur á samstarvi millum føroysk virkir, so at tey kunnu ogna sær serkunnleika hvørt á sínum øki og harvið gerast kappingarfør, heldur enn at fevna um alt, t. v. s. alt tað sama sum hini virkini. Tá kenna vit úrslitið frammanundan.

Tað almenna stuðlar ídnaði, handverki og tænastuvirksemi á so mongum økjum og á mangan hátt. Menningargrunnur Ídnaðarins, sum varð settur á stovn í 1973, hevur til 1988 fingið játtað 112,5 mill. kr. á fíggjarlógini. Við støði í hesum og landsstýrisins veðhaldum hevði Menningargrunnurin við árslok 1987 effektiv lán uppá umleið

232,5 mió. kr. Herumframt veðhelt grunnurin fyri umleið 32,5 mió. kr., og ár um ár hevur grunnurin veitt íløgustuðul og stuðul til gransking, vørumenning, kanningar, útbúgving og sølufremjandi tiltøk.

Meðan Menningargrunnur Ídnaðarins er førur fyri at veita lán við eini rímiligari rentu, so hevur Føroya Ídnaðargrunnur ikki sama møguleika. Landsstýrið umhugsar at bøta um møguleikarnar hjá hesum grunni. Í 1970 fekk hann eitt stovnsfæ uppá 4,5 mió. kr. Við árslok 1987 hevði grunnurin effektiv lán hjá ídnaði og handverki uppá umleið 185 mió. kr.

Til tess at ráðgeva landsstýrinum, almennu grunnunum, fyritøkum og einstaklingum, sum reka vinnufyritøkur ella hava áhuga fyri at fara undir slíkan rakstur, hevur Menningarstova Landsins virkað í nærum eitt ár. Enn er stovnurin lítil, men kortini hevur hann megnað at gjørt vart við seg, tá ið talan er um vørumenning, sølufremjandi arbeiði, skeiðvirksemi og ymiska ráðgeving.

Í samstarvi við ídnaðarfelagið, handverkara- og meistarafelagið, grunnarnar og aðrar stovnar fer Menningarstovan í næstum undir neyva virkis- og vøruskráseting. Ein slík skráseting vil mest av øllum tæna virkjunum og lángevarunum, men hon vil eisini sýna, um virkisøki eru, sum krevja serligan menningarstuðul.

Umframt frammanfyrinevndu grunnar og stovnar hevur landsstýrið eisini veitt lán og studning úr grunninum til ídnaðarfremjandi endamál, sum í serligan mun hevur stuðlað útjaðaravirkjum. Í sambandi við almennan partapening í virkir, har serligur tørvur er á arbeiðsskapandi tiltøkum, umhugsar landsstýrið at biðja tingið um at samtykkja eina heimildarlóg, soleiðis at landsstýrið saman við løgtingsins fíggjarnevnd kann seta upp til 20% av partapeninginum í slík virkir.

Fjarskotnum oyggjum og bygdum tørvar serligan menningarstuðul. Landsstýrið hevur umhugsað, á hvønn hátt Menningargrunnur Ídnaðarins kann veita slíkan stuðul.

Í sambandi við ymiskar javnføringar í lógini og reglugerðini fyri Menningargrunnin fer landsstýrið at leggja uppskot fyri tingið í hesi tingsetuni. Hesar broytingar umfata eisini serligar reglur fyri útjaðaraøkini.

## Landbúnaður

Seinastu 10 árini er mjólkarframleiðslan vaksin við sløkum 4 mió. litrum til 5,8 mió. litrar í 1988, og eru tað gott 100 húski, ið kunnu hava sína ársinntøku í mjólkarframleiðsluni.

Í 1987 vóru 5.483.877 litrar innvigaðir til mjólkarvirkini. Hetta er ein vøkstur uppá 13,7% frá árinum fyri.

Orsakað av hesum vøkstri var meirinýtslan umleið kr. 210.000,-.

Í 1988 tykist vøksturin ikki at fara at vera ovurhonds stórur. Teir fyrstu 5 mánaðirnar í 1988 er um 1,3% meira mjólk komin til mjólkarvirkini enn fyri sama tíðarskeiðið í 1987. Av tí at vøksturin er størri í mai mánaða enn undanfarnu 4 mánaðirnar, er rímiligt at meta vøksturin fyri árið 1988 til 3% og tað sama fyri árið 1989. Samsvarandi verður framleiðslan fyri 1989 mett til 5,8 mió. litrar.

Í 1987 varð studningur latin til umleið 11.663 litrar, sum vóru seldir privat.

Studningur varð í 1987 latin til 103.000 kilo av neytakjøti, harav uml. 13.000 kilo vóru úr bygdum, sum fáa hægra studningin.

Studningur varð latin til 58.300 kilo av grísakjøti í 1987, sum er munandi meira, enn mett var. Grísagarðurin í Froðba metir framleiðsluna í 1988 til 65.000 kilo og til 70.000 kilo í 1989.

Studningur varð í 1987 latin til 2.187.000 egg.

Økt framleiðsla skuldi minkað um studningstørvin, so spurningurin er, um hesin ikki

eigur at verða læstur fastur, so hann verður javnaður út á størra talið av eindum, tað verði seg kg, litrar ella stykkjatal.

Í 1987 vóru 274.000 m² veltir úr nýggjum, 94.000 m² umvældir og 2164 m av traktorvegnum gjørdir.

Traktorvegir inni á nýdyrkaðum lendi hava víst seg at vera neyðugir fyri at fáa grøðina forsvarliga til høldar, og kann tí roknast við vaksandi íløgum til hetta endamál.

Studningsupphæddin hevur ikki verið regulerað í fleiri ár, og er nú oftast niðanfyri 50% av vanliga kostnaðinum, tá hægsti studningur — kr. 3,50/m² verður latin.

Avloysingarskipanin hevur virkað í tvey ár, og útvegar Royndarstøðin enn bert í ávísan mun hesa avloysing, soleiðis at bóndin til sjálvur hevur roynt at fingið sær avloysing.

Til hetta endamál hava mjólkarframleiðarar samtykt at lata eina ávísa upphædd í ein avloysingargrunn.

Á lógarøkinum kann verða nevnt, at nýggj jarðarlóggáva er lýst. Henda lógin avloysir partar av lóg »for Færøerne om Jordbrugets Fremme«, frá 1937.

Henda nýggja jarðarlógin áleggur framleiðsluskyldu og ger tað møguligt at fáa annan festara ístaðin, um hon ikki verður hildin. Við hesum skuldu møguleikarnir hjá fyrisitingini at fáa festarar við yrkisligum fortreytum og hegni at røkja jarðarbrúk verið munandi betri enn eftir gomlu lógini.

## Alivinnan

Seinastu 10 árini hevur alivinnan verið í støðugum vøkstri. Í dag hava vit 21 smoltstøðir og 55 alistøðir á sjónum. Í ár er smoltframleiðslan 4,5 mió., og nøktar hetta tørvin í løtuni. Fýra smoltstøðir, sum hava fingið loyvi, eru enn ikki farnar undir framleiðslu. Tá hesar koma við — væntandi so, at tær koma at lata smolt næsta ár — verður framleiðslan 5,5 smolt.

Í 1987 var samlaði útflutningurin 3830 tons. Her er tann laksur, sum verður veiddur á víðum havi, taldur við í hagtølunum. Metingarnar fyri 1988 sýna, at útflutningurin verður 3220 ella 610 tons minni. Orsøkin er felli, serliga furunkolosufellið í juni 1986.

Landsstýrið hevur nú givið 14 nýggj loyvi til sjógvaling. Koma hesar í gongd, og fáa vit tamarhald á sjúkunum, verður framleiðslan 10.000 tons í 1989 og 12.000 tons í 1990. Við eini varisligari meting (50,- kr./kg) skuldi hetta givið eitt útflutningsvirði uppá ávikavist 500 og 700 mió. kr. nevndu ár.

Ein partur av teimum nýggju sjógvaliloyvunum eru givin á økum, har vit fyrr høvdu ta fatan, at aling ikki kundi fara fram, orsakað av aldu. Talan er sostatt um áhugaverdar royndir — royndir, ið kunnu ávísa enn størri møguleikar fyri aling á sjónum. Slíkar støðir hava størri framleiðsluorku, eru minni viðbreknar mótvegis sjúku og lætta um inni á firðum.

Alivinnan hevur havt og hevur framvegis ávísar fíggjarligar trupulleikar at dragast við. Orsøkirnar hava verið fleiri. Árini frammanundan var ov lítið smolt til taks. Príslegan á heimsmarknaðinum helt sær ikki á tí høga støði, hon var á tey fyrru árini. Trupulleikin við sjúkum gjørdist eisini størri enn væntað varð.

Nú er nóg mikið av smolti til taks. Fyri at bøta um fíggjarstøðuna hjá alivinnuni annars, er tað ætlan landsstýrisins at broyta áramálið í øllum loyvum. Tá talan er um sjógvalistøðir, umhugsar landsstýrið at broyta áramálið úr 7 upp í 10 ár. Viðvíkjandi føstum alibrúkum og smoltstøðumm verður umhugsað at broyta áramálið úr 7 upp í 12 ár. Landsstýrið roknar so við, at lánistovnarnir fara at leingja avdráttartíðina í sama mun.

Fiskasjúkulæknatænastan er av alstórum týdningi fyri vinnuna. Higartil eru tveir fiskasjúkudjóralæknar settir. Ætlanin er at útbyggja hesa tænastu.

Samtykt er at útbyggja støðina hjá P/F Fiskaaling við Áir. Útbyggingin kemur at kosta umleið hálvthundarð milliónir krónur, og verður henda framd yvir eitt fýra-seks ára skeið. Ætlanin við hesi útbygging er ikki, at støðin skal økja munandi um framleiðsluna av smolti og matfiski. Høvuðsendamálið er at bøta um umstøðurnar á støðini, soleiðis at hon í nógv størri mun kann skipa fyri royndum, fremja gransking og standa fyri praktiskari útbúgving og eftirútbúgving av fólki, sum starvast í vinnuni.

Týdningarmesta orsøkin er tó, at samstarvið, sum vit føroyingar hava havt við Noreg um kynsbótaarbeiði, av ymiskum orsøkum má broytast, soleiðis at vit sjálvir taka ábyrgdina av at útvega lívfisk á hægsta støði til ta skjótt vaksandi føroysku alivinnuna. Undir verandi umstøðum er støðin hjá P/F Fiskaaling ikki útgjørd til hetta arbeiði.

Eftir tilmæli frá sakkunnleikanum er landsstýrið komið til ta niðurstøðu, at økið norðuri við Áir ikki er væl hóskandi til útseting á havbit. Hinvegin verður Fámjin hildið at vera sera væl hóskandi. Í ár eru 45.000 laksasmolt sett út í Fámjin.

Um henda royndin gevur eitt nøktandi úrslit, heldur landsstýrið, at vit í framtíðini eiga at seta eitt munandi størri tal av laksasmolti á havbit. Kanningar í Íslandi sýna, at teir árið eftir útsetingina fáa 5% av laksinum aftur. Ein størri útseting er eisini við til at grundgeva okkara havfiskiskap eftir laksi.

Landsstýrið heldur, at allar royndir innan aling og havbit skulu fyriskipast av Fiskirannsóknarstovuni og P/F Fiskaaling.

## Sjóvinnumál

Landsstýrið hevur ynskt at seta fulltrúa í landsumsitingina at taka sær av sjóvinnumálum burturav.

Síðani tá hava vit fingið nýggja lóg um manning av skipum, nýggja sjómansløgtingslóg, lóg um sjóvinnu og nýggja lóg um mynstring av skipum.

Við undantak av ti seinastu, so skal landsstýrið í kunngerð boða frá, nær hesar lógir koma í gildi. Hetta hendir væntandi áðrenn árslok í ár. Eftir hesum lógum skulu vit hava eitt sjóvinnuráð, eina sjóvinnuumsiting og ein sjóvinnustjóra.

Landsstýrið hevur tó samtykt at fremja uppbyggingina av hesi umsiting yvir eitt áramál. Í fyrstu atløgu hevur landsstýrið samtykt at seta ein ráðgeva í sjóvinnumálum. Hesin tekur við fyrst í september 1988. Eftir hetta verður sjóvinnuráðið valt. Síðani verða umrøddu lógir settar í gildi.

Tá hetta er gjørt, kunnu vit boða frá til IMO, at Føroyar hava ratifiserað STCW-sáttmálan. Síðan skulu fleiri kunngerðir setast í gildi við heimild í nevndu lógum.

Ein stórur partur av farmaskipaflotanum kom í álvarsligar trupulleikar. Talan var um tann nýggjasta partin av flotanum. Hesin parturin av flotanum hevði ongan møguleika. Byggikostnaðurin var alt ov høgur. Rakstrarútreiðslurnar alt ov stórar og flutningsinntøkurnar alt ov lágar í mun til iløgurnar og rakstrarútreiðslurnar.

## Skattamál

Tá henda samgonga varð skipað, vóru størri broytingar í skattalógunum og ein útbygging av skattaumsitingini nøkur av høvuðsmálum landsstýrisins.

Hesi mál eru í høvuðsheitum nádd í dag.

— — —

Í Føroyum høvdu vit onga lóggávu fyri skatting av kapitalvinningi, so sum grannalond okkara høvdu. Vinningur við sølu av fastari ogn og skipum var skattafríur.

Hetta merkti, at persónar og feløg kundu vinna milliónaupphæddir, ja í mongum førum tíggjutals milliónaupphæddir skattafrítt við sølu av skipum ella fastari ogn.

Henda vantandi lóggáva var helst eisini ein av høvuðsorsøkunum til tær mongu sølurnar av gomlum skipum til uppskrúvað virði, og standa keypararnir av hesum skipum í dag við einari alt ov stórari afturgjaldingarskyldu, og kann hetta tí eisini sigast at vera ein av orsøkunum til trongstøðuna, partur av fiskiflota okkara er í í dag.

Eftir nýggju lógini verður kapitalvinningur skattaður sum vanlig inntøka.

———

Til tess at minka um privatnýtsluna framyvir og hjálpa til at tryggja, at tann vunni peningurin kemur vinnuni og serliga tí framleiðandi vinnuni tilgóðar, eru gjørdar ymiskar lógarbroytingar, og kunnu nevnast:

a. Flyting av negativari saldo millum teir einstøku kapitlarnar í avskrivingarlógini. T. d. kann nú negativ saldo, stavandi frá sølu av skipi, nýtast til íløgu í framleiðsluskapandi virksemi á landi.
b. Áður var tað møguligt at drena eitt partafelag uttan at gjalda skatt ella vinningsbýtisgjald. Hetta kundi gerast við at lata partabrøvini skifta eigara. Eftir nýggju reglunum verður vinningur við sølu av partabrøvum skattaður sum vanlig inntøka, tá eigarin hevur átt partabrøvini í minni enn 3 ár.
c. Avskrivingarmøguleikarnir hjá privatum vinnuvirkjum verða nú avmarkaðir eftir eginnýtsluni hjá eigarunum.
d. Avmarkingar eru gjørdar í avskrivingarmøguleikunum av serliga dýrum bilum.
e. Serlig lóg er gjørd fyri umskipan av privatum vinnuvirki til partafelag.

———

Revsireglurnar fyri brot á skattalógirnar vóru vorðnar ótíðarhóskandi og als ikki í samsvar við tilsvarandi reglur í grannalondum okkara.

Eftir verandi reglum kundi brot á skattalógirnar einans revsast við sekt, og kundi sektin, ið landsstýrið ásetti, verða upp til 5 ferðir ta upphædd, ið var útihildin, men praksis hevur verið at áseta sektina til einaferð ta upphædd, ið var útihildin.

Eftir nýggju reglunum verður brot á skattalógirnar revsað á líknandi hátt eins og onnur lógarbrot. Revsingin kann verða upp til fongsul í 2 ár undir serliga skerpandi umstøðum.

Eftir nýggju reglunum er eisini tann broyting farin fram, at umsitingin av vanligum sektarmálum er flutt frá landsstýrinum til líkningarráðið.

———

Tað var sokallaða sjálvstýrislandsstýrið, ið sat frá 1962 til 1966, ið álegði føroysku peningastovnunum upplýsingarskyldu mótvegis líkningarráðnum.

Henda upplýsingarskylda merkti, at skattavaldið kundi fáa allar teir upplýsingar av skattligum týdningi, tað ynskti um hvønn einstakan kunda hjá einum peningastovni. Líkningarráðið kann eftir hesi reglu t. d. fáa avrit av hvørjum einstøkum kekki, ið ein ávísur persónur hevur skrivað eitt ár, ella hvørjari bankaflyting, hann hevur gjørt o. s. fr.

Nevnda upplýsingarskylda stendur við óbroytt, men liggur broytingin nú í, at heimild er skapt, fyri at nýta ta tøknifrøði, ið er vorðin tøk saman við samtíðarskattaskipanini, til automatiskt at útvega skattavaldinum ein part av teimum áðurnevndu upplýsingum, nevniliga upplýsingar um innistandandi og skuld við ársenda og upplýsingar um rentur. Talan er soleiðis ikki um, at skattamyndugleikarnir fáa beinleiðis atgongd til konti hjá spararunum, men møguleiki er tó framvegis hjá líkningarráðnum at skriva til peningastovnarnar smbr. heimildina frá 1963 og fáa nevndu upplýsingar.

Broytingin í upplýsingarskylduni merkir, at líkningararbeiðið kann gerast munandi

meira effektivt, og at samtiðarskattaskipanin kemur at arbeiða rættari og tryggari fyri skattgjaldaran.

———

Í byrjanini av skeiði sínum gjørdi landsstýrið ein nýggjan dupultskattasáttmála við donsku ríkisstjórnina, sum kom í gildi 1. januar 1987.

Í løtuni verður samráðst við hini norðurlondini um føroyska luttøku í felags norðurlendska dupultskattasáttmálanum og felags norðurlendsku »bistandsavtaluni«.

Roknast kann ikki við trupulleikum at koma við í norðurlendsku »bistandsavtaluna«, men hvat sjálvari dupultskattaavtaluni viðvíkur, er tað eitt sindur truplari at siga nakað enn; samráðingar verða í Føroyum fyrst í september mánaði, og aftaná hesar, kann væntandi sigast, um vit kunnu fáa nóg mikið av okkara ynskjum uppfylt, til tess at vit kunnu fara upp í avtaluna.

———

Fyrsti parturin av samtiðarskattaskipanini fór í gongd 1. apríl 1984, tá blivu tær fyrstu 3 skráirnar tiknar í nýtslu, men vóru stórir partar av skipanini enn eftir at gera.

Á ein hátt kann ein siga, at skipanin er liðug nú. Tær ætlanir, ið upprunaliga vóru gjørdar, eru settar í verk, so at vit í dag hava eina skipan koyrandi við 17 skráum.

Hinvegin kann eisini sigast, at samtiðarskattaskipanin ongantíð verður liðug. Ein so framkomin edv-skipan sum samtiðarskattaskipanin skal alla tíðina haldast viðlíka, og tillagingar skulu gerast samsvarandi broytingum í samfelagnum annars.

Landsstýrið hevur eisini avgjørt at nýta samtiðarskattaskipanina til aðrar uppgávur so sum:

1. frítíðarløn,
2. barnastyrk,
3. trygdargrunn løntakaranna og
4. arbeiðsmarknaðareftirløn.

Hetta eru stórar uppgávur, ið her eru lagdar á P/F Elektron og umsiting líkningarráðsins, og skotbráið, ið hesir stovnar hava fingið til at fáa hesar skipanir at virka, hevur verið stutt, og neyðugt hevur tí verið at útsett ávísar skattauppgávur sum t. d. framskundan av ársuppgerðini.

Orsøkin, til at landsstýrið hevur valt hesa loysn, er, at hon er munandi bíligari, enn um serstakar edv-skipanir og serstøk umsiting skuldi verið bygd upp fyri nevndu uppgávur.

Arbeiðið við útbygging av samtiðarskattaskipanini er gjørt í tøttum samarbeiði millum Føroya Landsstýri, Líkningarráð Føroya og P/F Elektron. Arbeiðið er farið fram á tann hátt, at landsstýrismaðurin í skattamálum sjálvur luttektur beinleiðis í stýrisbólkinum fyri samtiðarskattaskipanini.

Samanumtikið kann sigast, at samtiðarskattaskipanin er eitt dømi um, at vit í Føroyum megna at loysa størri edv-uppgávur (útlendingar vísa t.d. stóran áhuga fyri samtiðarskattaskipanini), bert spell, at henda skipan framyvir kemur at verða dýrari, orsakað av at tann eini av luttakarunum í P/F Elektron flytir sínar edv-uppgávur til Danmarkar, og tað soleiðis verða færri um at bera tær føstu útreiðslurnar hjá P/F Elektron.

———

Áður hava einans Tórshavn og Klaksvík havt nakra veruliga skattaumsiting. Hetta merkti, at skattaálikningin ikki var eins um alt landið, sum ásett er í skattalógini. Havnar kommuna visti eisini fleiri ferðir á tað skeiva í, at tað skattliga skuldi vera lættari at búgva uttan fyri Havnina.

Við samtíðarskattaskipanini fingu vit eina skipan, har hvør einasta lønarútgjalding verður skrásett og viðgjørd, og merkti hetta eitt munandi størri samskifti millum skattgjaldara og skattavaldið.

Sum áður nevnt er samtíðarskattaskipanin eisini útbygd til at loysa aðrar uppgávur, frítíðarlønin og barnastyrkurin eru farin at virka, og arbeitt verður uppá trygdargrunn løntakaranna og arbeiðsmarknaðareftirløn, og fara hesar skipanir ætlandi í gongd um árs-skiftið 1988/89.

Landsstýrið setti sær tí sum mál at útbyggja skattaumsitingina, so at nevndu uppgávur kundu røkjast, og álikningin kundi blíva meira virkin og samlík.

Hetta kundi verið gjørt við at útbygt umsitingina í Tórshavn, men landsstýrið valdi heldur at skipa líkningarráðsdeildir í høvuðsøkjunum úti um landið, og er hetta arbeiðið um at verða liðugt. Seinastu deildirnar verða lætnar upp um einar tveir mánaðir, samstundis er høvuðsskrivstova líkningarráðsins umskipað í 4 deildir. Eisini eru tiltøk sett í verk fyri at útbúgva starvsfólkið í skattaumsitingini.

Tað, sum rokkið er við hesi útbygging, er:

a. Arbeiðspláss eru flutt út á bygd.
b. Líkningin er vorðin samlík um alt landið.
c. Líkningin er eisini vorðin meira effektiv.
d. Tænastustøðið mótvegis skattaborgarunum er vorðið betri.

— — —

Síðan vit fingu samtíðarskattaskipanina, hava tað serliga verið tveir bólkar, ið hava verið misnøgdir við, at teir ikki kundu verða við í A-skattaskipanini, nevniliga tey danskt løntu í Føroyum og føroyingar við donskum fiskiskipum.

a. Danskt lønt: Her er júst fingin ein loysn, so danir nú eru farnir at avrokna um góðkend føroysk avrokningarstøð.
b. Føroyingar við donskum fiskiskipum: Her hava føroysku skattamyndugleikarnir ikki heimild at áleggja donsku arbeiðsgevarunum at avrokna um góðkend føroysk avrokningarstøð, men føroysku peningastovnarnir arbeiða við at fáa sjálvbodnar loysnir við danskar arbeiðsgevarar, men eftir hvat skilst, so vísir hetta seg at vera trupult.

— — —

Seinast í juni mánað í ár samtykti fólkatingið at avtaka donsku sjómansskattalógina, og samstundis bleiv ein lóg samtykt um eina danska altjóða skipaskrá. Hetta merkir, at føroyingar, ið áður hava verið skattaðir eftir donsku sjómansskattalógini, nú vera skattskyldugir eftir føroyskari skattalóg.

Føroyingar, sum sigla við skipum skrásett undir donsku altjóða skipaskránni, eru tí verri fyri enn teirra donsku starvsbrøður. Arbeitt verður í løtuni við eini loysn av hesum spurningi.

— — —

Tá táverandi danski skattamálaráðharrin Isi Foigel var í Føroyum í 1986, gav hann lyfti um, at Føroyar skuldu fáa rættin at skatta eftirlønir frá donskum eftirlønargrunnum, sum verða sagdar upp í ótíð, og danskar kapitaleftirlønir, um móttakararnir búgva í Føroyum.

Um ein partur av útgjaldingini stavar frá inngjaldingum, ið viðkomandi hevur gjørt, meðan hann hevur verið skattskyldugur í Danmark, so skal hesin partur skattast í Danmark.

Danska skattamálaráðið hevur nú gjørt lógaruppskot hesum viðvíkjandi, og verður hetta uppskot lagt fyri fólkatingið í næstum.

— — —

Líkningarráðið hevur seinastu tíðina arbeitt við at dagføra allar skattalógir. Hetta arbeiði er líðugt, og eru dagførdu skattalógirnar saman við kunngerðum, reglugerðum, rundskrivum, vegleiðingum, dupultskattasáttmála v. m. samlað í eina bók.

## Orkuútbygging

Í røðuni í fjør var eg bjartskygdur viðvíkjandi eini fyrireiking, sum SEV og Orkuráðið vóru farin undir av útbygging av vatnorkuni í hæddini í Eysturoy.

Hóast Orkuráðið klettafast hevur ávíst, at SEV tveitir 40% av orkuni burtur við at útbyggja í neðra, so er henda hildin fram í heimildarloysi.

Metingin, um at skil kom at ráða, brast, og landsstýrið hevur tí í skeivari vón hjálpt SEV burtur úr teim fíggjartrupulleikum, felagið í fjør hevði komið sær í við at læna 70 mill. kr. frá byggifelagnum, tó at teir longu høvdu bygt fyri meira enn 300 mill. kr. Loyvið til at læna hesar 70 mill. kr. eyka varð givið við teirri serliga tilskilaðu treyt, at ikki nýggj óheimilað lántøka bleiv framd. Kortini er hetta helst hent, síðan ein bygging, har bert 60% av hvørjari krónu komu til nyttu, heldur fram.

Serlig lániheimild er veitt til upptøku av láni til motorútbyggingina.

Landsstýrið hevur játtað stuðulslán til eina verkætlan, sum Tórshavnar Kommuna og SEV hava um nýtslu av avlopshita til húsaupphiting.

Annars hevur Orkuráðið latið frágreiðing um virksemi sitt, og er henda hjáløgd sum skjal. Forvitnisligt er arbeiði ráðsins við streymorkuverki í Vestmannasundi.

## Íbúðamál

Tað tykist alsamt at vera stórur tørvur á sethúsalánum úr Húsalánsgrunninum, bæði til bygging av nýggjum húsum, til keyp av gomlum húsum og eisini til umbygging.

Í 1987 var talið av lánum 578. Samlaða útlánsupphæddin var 73 mió. kr. Á fíggjarlógini fekk grunnurin 15 mió. kr., meðan restupphæddin varð útvegað við lántøkum her heima m. a. úr oljugrunninum, frá teimum ymisku tryggingunum o. s. fr.

Í 1988 og 1989 tørvar grunninum ávikavist 101 og 106 mió. kr. Í ár er játtanin á fíggjarlógini hækkað uppí 27 mió. kr. Umframt hetta hevur grunnurin fingið lán úr Oljugrunninum, Íløgugrunninum, Íleggingargrunninum fyri Føroyar og frá tryggingunum.

Higartil hevur Húsalánsgrunnurin tilsamans veitt 476,5 mió. kr. í lánum til sethús. Samlaða stovnsfæ grunnsins úr landskassanum er 146,4 mió. kr. Tey størstu einstøku útlánini eru nú 230.000 ,- kr.

Við verandi fíggjarorku er Húsalánsgrunnurin bert førur fyri at veita 25% av tí samlaðu sethúsafíggingini. Eftir lógini kann grunnurin veita upp til 90%.

Ein fyribils setningur má verða, at grunnurin kemur uppá 50% av samlaðu fíggingini, soleiðis at hesin saman við sparikassunum kundi fíggjað tey 90%'ini.

Hóast nýggja lóg um íbúðagrunn og ávísar broytingar í lógini um rentustudning til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging, so verða hesir møguleikar lítið nýttir. Orsøkin er møguliga ov lítil upplýsing um hesar møguleikar.

Íbúðagrunnurin fær 1,5 mió. kr. á fíggjarlógini. Samlaða stovnsfæið er nú 15,6 mió. kr. Rentustudningurin úr landskassanum til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging er 3%.

## Almannamál

1. januar vórðu fólkapensión og avlamispensión hækkað ájavnt við pensiónina í Danmark á flest øllum økjum.

Heildarveitingin broytti ikki fíggjarmynstrið fyri pensiónina, sum framvegis er 50%

donsk og 50% føroysk, men nakrar aðrar almannaveitingar vórðu broyttar soleiðis, at parturin hjá ríkiskassanum nú er 25%. — Onnur øki eru broytt tann vegin, at fíggjarliga ábyrgdin einans er hjá føroyskum myndugleikum. Talan er her um íløgur og rakstur av røktarheimum, heimahjálp og fyri barnastyrk.

Við heildarveitingini fingu føroyskir myndugleikar eisini ábyrgdina av sjúkrakassunum, sum áður bert høvdu samskifti við ríkisstýrið. Fyri sjúkrakassalóggávuna er nakað serligt galdandi — eins og fyri ávís onnur lógarøki. Heimastýrið kann av sínum eintingum gera broytingar í hesum lógum, sjálvt um tær eru samtyktar av fólkatinginum, og so koma tær føroysku reglurnar ístaðin fyri reglurnar í verandi lóg.

Frá 1. januar varð eisini Andveikraverndin yvirtikin sum føroyskt mál. Útreiðslurnar vórðu áður ríkisútreiðslur burturav, men eru nú landskassaútreiðslur.

Barnastyrkur, sum í byrjanini varð samtyktur at verða settur í mun til inntøku, er broyttur, og verður veittur uttan mun til inntøku.

Brennistudningurin til pensiónistar, sum kemur til útgjaldingar seinni í ár, er hækkaður til 2.200,- kr. og er samstundis eisini vorðin ein samskiftisstudningur, sum kann nýtast til at rinda part av útreiðslum til sjónvarps-, útvarps- og fast telefongjald.

Røktar- og umlættingarheimið »Lágargarður«, sum kommunurnar í Suðurstreymoy hava bygt, er tikið í nýtslu. Tað fer eisini at virka sum dagheim fyri heimabúgvandi gomul og brekað.

Í hinum norðurlondunum verða ikki slík heim bygd meira. Nú verða bygdar vardar íbúðir ístaðin, har tey gomlu meira kunnu liva sítt egna lív. — Tey missa ikki pensiónina heldur, men gjalda húsaleigu o. a. sjálvi, so langt tey eru før fyri tí.

Henda vegin eiga vit eisini at fara í Føroyum.

Tí arbeiðir landsstýrið í løtuni við at fáa betri møguleikar fyri, at vardar íbúðir kunnu verða bygdar, og umhugsar at seta lógina um kollegiubygging til at vera galdandi eisini fyri vardar íbúðir.

Í Klaksvík er vardur verkstaður tikin í nýtslu, og eitt umlættingarheim fyri evnaveik verður eisini skjótt klárt at taka í nýtslu har.

Vardi verkstaðurin í Vági er nærum liðugur at taka í nýtslu, og leiðari er settur.

Røktarheimsætlanirnar í Sandoy eru komnar so langt, at byggingin skjótt kann byrja, og vónandi verða ætlanirnar um heim í Norðurstreymoy framdar nakað skjótt.

Í sambandi við hjálp til gomul, brekað fólk, vil landsstýrið seta ein serlækna fyri gomul.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við málinum um at seta á stovn ein kærustovn fyri avgerðir á almannaøkinum. Enn er ikki greitt, um stovnurin einans skal avgreiða mál um endurbúgving og hjálpartól, ella stovnurin eisini skal taka sær av øðrum málum, t. d. viðvíkjandi forsorgarhjálp og bjálvingarstuðulsláni.

Arbeitt verður eisini við at seta á stovn ein barna- og møðrahjálparstovn, sum stuðuls- og ráðgevingarstovu hjá teimum, ið søkja fosturtøku.

Somuleiðis verður arbeitt við málinum um, hvussu fólka- og avlamispensiónistar kunnu fáa meira burturúr tí arbeiðsinntøku, tey hava aftrat pensiónini, og ikki — sum nú — missa allar viðbøtur.

Miðspjaðingarnevndin er nú liðug við arbeiði sítt. Ætlan landsstýrisins er at byrja í hesum ári við at leggja sosialar deildir út á bygd, eina í hvørja sýslu.

## Kommunumál

Í royndunum at fyriskipa desentralisering av almennum stovnum eru nú líkningardeildir settar á stovn í hesum bygdum:

Klaksvík, Fuglafirði, Runavík, Kollafirði, Sandavági, Skopun og í Vági.
Arbeiðseftirlitið hevur somuleiðis fingið skrivstovur á bygd.

Kommunali lánigrunnurin fekk av yvirskoti landskassans fyri 1986 játtað 40 milliónir kr., sum var eitt munagott ískoyti til grunnin.

Fyri at tálma tí yvirupphiting, sum hevur verið í byggivirkseminum á landi, hevur landsstýrið verið afturhaldandi við at geva loyvi til ótálmað lán til kommunur og biðið kommunur steðga við teimum arbeiðum, sum tola at bíða.

Hetta er gjørt fyri at skapa skipum og fiskavirkjum betri arbeiðskor, tá tey nú eina tíð hava havt torført við at skaffa manning og arbeiðsfólk, og tiskil hava noyðst at sent boð til útlandið eftir skipsmonnum og arbeiðsfólki.

Arbeitt verður við tankanum um at broyta kommunalu vallógina soleiðis, at tær smærru bygdirnar fáa møguleika at verða umboðaðar í størri kommunalum samanhangi.

## Skúli og undirvísing

Landsstýrið hevur lýst Løgtingslóg nr. 62 um ávísar skúlar, og landsstýrið hevur heitt á Landsskúlafyrisitingina um at fara undir at fyrireika projektering og bygging av teimum skúlabygningum, sum har eru umrøddir, og gjørt vart við, hvørjir skúlar, ið eiga at koma í fremstu røð.

Landsskúlafyrisitingin er farin undir fyrireikingarnar til tess at seta á stovn yrkisskúla fyri fiskaídnað og havbúnað í Vestmanna, so at hann kann byrja í leigaðum hølum í januar komandi ár. Ætlanin er eisini at fáa tøkniligan yvirbygnað til henda skúla, sum eisini skal hava deild í Vágum.

Á Føroya Maskinskúla hevur nú tann fyrsti flokkurin tikið víðkað maskinmeistaraprógv, og farið er undir at fyrireika upptøku av næmingum til installatørútbúgving, so at fyrsti flokkurin kann byrja í januar 1989. Ætlanin er eisini at fara undir dugnaskapsroynd í motoransing frá 1. januar komandi ár. Landsstýrið hevur biðið Landsskúlafyrisitinginga gera uppskot um lóg um maskinmeistaraútbúgving, so vit fáa føroyska lóggávu á øllum hesum útbúgvingarøki.

Í hesum árinum verður farið undir nýggja skiparaútbúgving, sum samanlagt fer at vara 18 mánaðir. Eftir 12 mánaðum kunnu næmingarnir taka heimaskiparaprógv og halda fram í 6 mánaðir til skiparaprógv.

Skipskokkaútbúgvingin verður umskipað, soleiðis at hon kemur at fevna um grundskeið, starvslærutíð og skipskokkaskeið. Øll útbúgvingin kemur tilsamans at vara í 3 ár.

Umbyggingin á sjómansskúlanum er um at vera liðug, og støða skal takast til útbjóðing av uppibyggingini.

Landsskúlafyrisitinging arbeiðir við uppskoti um eina heildarætlan fyri útbúgvingar á teknisku skúlunum. Dentur verður lagdur á, at útbúgvingin á teknisku skúlunum eisini fer at fevna um útbúgvingar innan matvøru og matvøruídnað.

Byggiteknikaraútbúgvingin, sum ætlað var at fara undir nú í august mánaði, verður at bíða til januar.

Skeiðætlanin til landmálarateknikaraútbúgvingina er liðug og góðkend.

2. byggistig av Tekniska Skúla í Klaksvík gongur eftir ætlan, og verður nevnda útbygging liðug komandi ár.

Verkstaðarskúlin, sum vit roknaðu við at fara í gongd við nú í august í Klaksvík, fer ætlandi í gongd um ársskiftið.

Nevnd arbeiðir við uppskoti um broytingar í studentaskúla- og HF-skipanini, og miðað

verður ímóti, at nevndin verður liðug við arbeiði sitt, so at farast kann undir ta nýggju skipanina á heysti 1989.

Við Føroya Studentaskúla og HF-skeið er settur fakráðgevari í føroyskum, og við hesum er skipan nú fingin um, at lærarar við føroyskum sum høvuðs- ella hjágrein kunnu taka pedagogikum í føroyskum. Hetta fer at menna móðurmálsundirvísingina á nevndu skúlum.

Á Føroya Handilsskúla er skipað fyri møguleika at fara undir HD-útbúgving. Hetta kemur væl við hjá handils- og vinnulívsfólki, sum aftan á vanliga arbeiðstíð kunnu taka HD-útbúgving á kvøldskeiði.

Ætlanin er, at Handilsskúlin á Kambsdali verður tøkur til skúlagongd komandi summar.

Sum kunnugt hevur leingi verið í umbúna at seta sjúkrahjálpara- og sjúkrarøktaraútbúgving á stovn í Føroyum. Nú sær tað út til, at henda ætlan verður veruleiki.

Tann námsfrøðiliga útbúgvingin á Føroya Læraraskúla fyri fólki, ið skal arbeiða á dag- og bústovnum og innan frítíðarvirksemi, hevur higartil hepnast væl sum ein royndarskipan, og ætlanin er nú at seta útbúgvingina veruliga á stovn og at taka ein nýggjan flokk uppaftur í januar 1989.

Nevnd verður sett at kanna, um torvur er á at seta á stovn sosialráðgevaraútbúgving í Føroyum, og um tørvur er á hesi útbúgving at gera uppskot um slíka.

Nevndin, sum skal gera uppskot um nýggjar lesiætlanir fyri fólkaskúlan og endurskoða fólkaskúlalógini, er komin væl áleiðis við arbeiði sínum.

Serundirvísingarnevndin hevur lagt fram uppskot, sum enn eru arbeiðstilfar hjá Landsskúlafyrisitingini, um sernámsfrøðilig skúladømi og um, hvussu Skúlin á Trøðni eigur at verða brúktur.

Menningin innan frítíðarundirvísingina hevur verið stór hesi árini. HF-stakgreinaskeið og skeið til stakgreinaundirvísing til fráfaringarroyndir fólkaskúlans umframt yrkiskend skeið og serundirvísing fyri fólk fyri skúlaaldur, er sett á stovn ymsastaðni í landinum, og tey eru mong, ið taka undir við hesum tilboði.

Musikkskúlin, ið hevur nøkur ár á baki sum skipan fyri alt landið, hevur fingið góða undirtøku, og stavnhaldið, at so nógv børn og ung sum gjørligt skulu hava í boði musikkundirvísing á høgum stigi, er rokkið víða um landið.

Tað verður innrættað Landsmiðstøð fyri undirvísingaramboð. Leiðari er settur, og onnur fólk verða sett honum til hjálpar, áðrenn langt umlíður.

Vaksandi játtan á fíggjarlógini til gerð av undirvísingartilfari á føroyskum hevur nú sýnt seg við øktum útgávuvirksemi børnum og ungdómi okkara til frama.

Vit kunnu taka samanum og siga, at hetta landsstýrið hevur lagt lunnar undir og skapt fortreytir fyri framhaldandi menning og gróðri innan skúla og undirvísing til gagns fyri øll, ið her balast og liva.

## Arbeiðaramál

Setningurin, ið settur varð, tá ið hetta landsstýrið tók við, er nærum rokkin.

Í 1985 samtykti landsstýrið eina ætlan um útbygging av arbeiðseftirlitinum við deildum kring landið. Higartil er deild sett á stovn í Norðoyum, í Suðuroy og í Eysturoy. 1. januar 1989 verður tann seinasta sett á stovn. Henda skal umfata Vágoy og Norðstreymoy.

Sama ætlan fevndi eisini um skipan av einum arbeiðsumhvørvisráði og skipan av starvi sum serlækni í arbeiðsmedisini. Arbeiðsumhvørvisráðið er valt og mannað við umboðum frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og við stjóranum á Arbeiðseftirlitinum sum

formanni. Í løtuni arbeiðir arbeiðsumhvørvisráðið við at gera uppskot til arbeiðsumhvørvislóg. Serlæknin í arbeiðsmedisini varð settur í starv frá 1. juli í ár.

1. september í ár fær Arbeiðseftirlitið ein ergoterapeut. Hesin skal leiðbeina og ráðgeva virkjum innan ergonomi.

Í september í fjør varð ein norðuratlantisk ráðstevna um arbeiðsumhvørvið í fiskiídnaðinum hildin í Føroyum. Hetta var næsta norðurlendska ráðstevnan av sínum slag, men tann fyrsta norðuratlantiska, har meginparturin av luttakarunum komu úr norðuratlantisku londunum. Íalt vóru 130 luttakarar á stevnuni. Hesir komu frá pørtum á arbeiðsmarknaðinum og frá viðkomandi almennu stovnunum.

Í 1986 fingu vit nýggja lóg um frítíð við løn. Sambært nýggju lógini skal frítíðarprosentið hækka úr 9½% uppi 12% eftir trimum árum. T.v.s. at frá 1. apríl í ár er frítíðarprosentið 12. Somuleiðis verður frítíðin longd úr fýra upp í fimm vikur, eisini í trimum stigum. Í 1989 er frítíðin fimm vikur.

Við heimild í lógini um frítíð við løn hevur landsstýrið samtykt eina kunngerð um virksemi og fyrisiting av almenna frítíðargrunninum. Stovnar og feløg, sum hava til endamáls at skapa løntakarum frítíðarmøguleikar, kunnu søkja grunnin um lán og stuðul. Í løtuni eigur grunnurin 5.5 mió. kr. Árliga inntøkan hjá grunninum er umleið 2 mió. kr.

Í tingsetuni 1986 varð lógin um Trygdargrunn Veiðumanna broytt, soleiðis at grunnurin eftir hetta veitti trygd til teirra, sum arbeiða á fiskavirkjum. Í tingsetuni 1987 varð lógin um trygdargrunn aftur broytt. Grunnurin ber nú heitið: »Trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir v.m.«. Endamál grunsins er at tryggja øllum løntakarum lønarágóða og øllum skipa- og bátaeigarum avrokning fyri fisk, sum er avreiddur til føroysk fiskavirki, tá ið arbeiðsgevari ella fiskavirki t.d. kemur í fíggjartrot (konkurs).

Í seinastu tingsetu samtykti tingið lóg um *Samhaldsfastan Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn*. Lógin fær gildi frá 1. januar 1990. Tá skulu arbeiðsgevarar og løntakarar rinda hvør sítt prosent inn í grunnin. Hetta inngjald hækkar stigvist, til tað í 1999 kemur uppá 2% frá hvørjum. Fyrstu útgjaldingarnar úr grunninum fara fram frá 1. januar 1992. Øll fáa lut í arbeiðsmarknaðareftirlønini, og tá ið útgjaldingin er komin í fulla hædd, verður hon at svara til umleið 50% av galdandi fólkapensión. Spurningur er, um ikki rætt er at broyta lógina, so skipanin tekur við 1. mai 1989.

Á arbeiðsmarknaðarøkinum kannar og umhugsar landsstýrið eina fast- ella minstulønarskipan fyri fólk á fiskavirkjum. Landsstýrið hevur kannað íslendsku skipanina og bíðar nú eftir, um íslendingar lata hesa skipan galda víðari, um hon verður sett úr gildi ella verður galdandi við ávísum broytingum.

Hóast uppskot landsstýrisins um javnstøðulóg ikki varð samtykt, so fylgir landsstýrið væl við, hvat fyriferst uttanum okkum á javnstøðuøkinum.

Í juni mánaði í ár hevði javnstøðunevndin hjá norðurlendska ráðharraráðnum fund í Føroyum við tí endamáli at gera eina norðurlendska verkætlan um javnstøðu fyri tey næstu fimm árini. Javnstøðunevnd landsstýrisins var umboðað á hesum fundi.

Í komandi viku verður hildin javnstøðuráðstevna í Oslo, har allir teir norðurlendsku javnstøðuráðharrarnir luttaka, eisini okkara landsstýrismaður í javnstøðumálum.

## Samferðslumál

Samferðslumálini eru lýst í fylgiskjølum frá landsverkfrøðingsstovninum, men tvær sera stórar íløgur standa fyri, og skulu tær nevnast serstakt.

Ferjulega á Gomlu rætt saman við havnabygging í Skopun og undirsjóvartunnil undir Vestmannasundi, verða tung at lyfta, men soleiðis sum miðdeplaútviklingurin hevur tikið

seg upp, er forsvarligt at styrkja møguleikarnar hjá Vágoynni, Sandoynni og Suðuroynni at fáa lut í menningini. Hetta seinasta gerst so fyribils frægast við at útbyggja ferju- og tyrlusambandið við Suðuroynna so nógv, sum til ber.

At undirsjóvartunnilin fær eina munandi sjálvfígging kann bert metast stórur fyrimunur.

Landsstýrið hevur í ætlan síni um endurskipan av umsitingini í Tinganesi í hyggju at skipa viðgerðina av landsstýrisins parti av samskiftismálum í serstaka deild við deildarleiðara. Søkt verður eftir slíkum fyrsta dagin.

## Flogferðsla

Samferðslusøga varð skrivað, tá vit sjálvir settu á stovn flogfelag: Atlantic Airways.

11. juni 1976 varð gjørt greitt í fólkatingskunngerð, at 1. oktober 1985 bleiv einkarrættur DDLs at reka innlendis ella altjóða rutuflogferðslu í/úr Føroyum tikin av.

26. mars í ár kom flogfarið BA 146 hjá Atlantic Airways til Føroyar, og longu 28. mars byrjaði reglulig rutuflúgving Vágar/Keypmannahavn.

Føroyingar eiga 51% av partapeninginum í Atlantic Airways og Cimber 49%, og føroyingar kunnu yvirtaka størri part frá Cimber Air, tá nøkur ár eru liðin.

Avtalað er, at Cimber Air skal átaka sær at útbúgva føroyingar innan loftferðslu: flogskiparar, mekanikarar, flogternur, fyrisitingarfólk og onnur neyðug starvsfólk, sum skulu til fyri at reka eitt vælvirkandi flogfelag. Eini 20 til 25 fólk.

Sum kunnugt er Cimber Air dømt at fara úr samarbeiðinum við Atlantic Airways. Í løtuni verður arbeitt fyri at finna eina loysn á hesum spurningi.

Annar merkisdagur í flogsøgu føroyinga er 1. desember 1985, tá ið vit sjálvir yvirtóku operativu og teknisku umsitingina av tyrlutænastuni her á landi og sostatt stóðu á egnum beinum.

Miðvíst hevur verið arbeitt við at útbyggja tyrlutænastuna, og í dag hava vit Snipuni og Vípuni vunnið væl framá, sjálvt um týðandi spurningar eru eftir at loysa.

Nú eru møguleiki at taka ábyrgdina av sjúkraflutningi, at flúgva til verju av sjómarkinum, at gera uppgávur fyri stovnar, feløg og einstaklingar.

Seinna tyrlan sparir tyrlutænastuni upp í 2 mill. kr. árliga í »back-up« útreiðslum, soleiðis at keypspeningurin er vunnin inn aftur eftir 3-4 árum.

Ynski landsstýrisins hevur verið, at ein tyrla skal vera tøk alt døgnið, og soleiðis m.a. tryggja útoyggjafólki tryggan flutning alt árið.

Tyrlutænastan flytur til Vágarnar, so skjótt hetta tekniskt letur seg gera.

Nýggj lóg um loftferðslu er komin í gildi í Føroyum. Hon kom ístaðin fyri lógina frá 1923, sum hon varð broytt í 1937.

Nýggja loftferðslulógin er sett í gildi við kgl. fyriskipan, og er tað lóg nr. 252 frá 10. juni 1960 um loftferðslu við seinni broytingum.

Spurningurin um at seta nýggja loftferðslulógina í gildi í Føroyum hevur verið tengdur saman við spurninginum um loysn av millumlandaflúgvingini.

Statens Luftfartsvæsen hevur gjørt eina fimm ára íløguætlan fyri flogvøllin í Vágum. Ætlanin er fram til 1993 at brúka uml. 60 milj. kr. til umsiting og nýggjar íløgur:

| | | |
|---|---|---|
| 1988 0.525 milj. kr. | 1990 12.490 milj. kr. | 1992 19.360 milj. kr. |
| 1989 4.750 milj. kr. | 1991 4.495 milj. kr. | 1993 17.140 milj. kr. |

Landsstýrið hevur íløguætlanina til viðgerðar í løtuni.

## Telefonverkið

Telefonskipanin verður framhaldandi útbygd í høvuðsheitum smbr. 5-ára útbyggingarætlanina, ið varð samtykt av løgtinginum á vári 1986.

Í mun til hesa ætlan eru fíggjarviðurskiftini munandi batnað, grundað á lægri dollaravirði, vaksandi inntøku og lægri vøkstur av útreiðslunum. Hetta hóast takstirnir hava verið óbroyttir øll hesi trý árini 1986, 87 og 88.

Útbygging, sum er í gerð, og er og verður framd í 1988, er Klaksvíkarstøðin. Hon er økt við 1000 telefonnumrum uppí 3000 nr. Um 20. oktober 1988 verður nýggj støð við 3000 nr. sett til í Runavík, og tann gamla við 1600 nr. tikin úr nýtslu. Hetta tiltak verður at bøta munandi um alla telefonskipanina í Eysturoynni.

Í Suðuroynni eru Sumba og Hvalba digitaliserað, og um miðjan september í ár verður Tvøroyri digitaliserað. Seinni í vetur kemur Vágur uppí hesa skipan, men longu í sept., tá ið Tvøroyrar-støðin verður umløgd, verða telefonviðurskiftini í Suðuroynni sum heild í lagi.

Uppsetingin av Nordisk Mobil Telefon, sum virkandi partur av NMT-skipanini í hinum norðurlondunum, er komin væl áleiðis.

L. M. Ericsson verður at royndarkoyra skipanina í sept.-okt. 1988, og telefonverkið ger endaligu yvirtøkuroyndirnar í nov.-des. 1988. Møguliga kunnu felagar nýta skipanina longu í royndartíðini nov.-des. í ár, men endalig støða valdast, hvussu royndarkoyringin gongst.

Serlig NMT-telefonstøð til 4000 felagar er uppsett á telegrafstøðini, og 1. januar 1989, tá ið royndarkoyringarnar eru lidnar og skipanin tikin í nýtslu, verða til taks níggju ymiskar radiostøðir um alt landið við 96 radiorásum. Seinni koma fleiri støðir afturat.

Nýggja 200-kW millumbylgjustøðin í Akrabyrgi er nú í gerð og verður liðug í summar. Heta er eitt gamalt ynski, serliga hjá sjómonnum, sum nú er vorðin veruleiki.

Sum fráboðað í seinastu løgmansrøðuni, hava drúgvar samráðingar verið millum Post- og Telegrafvæsenet, Telefonverkið, GN Store Nordiske Telegrafselskab og landsstýrið um yvirtøku av Telegrafstøðini.

Sjálv yvirtøkan fer fram nú 1. august 1988, og frá sama degi verður Telegrafstøðin ein partur av bygnaði telefonverksins.

Drúgvar samráðingar hava verið um at tryggja setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á Telegrafstøðini aftan á eina yvirtøku. Hóast endalig avgreiðsla av samráðingarúrslitinum enn ikki er farin fram, so metir landsstýrið, at úrslitið er til frama fyri allar partar.

Í samband við samráðingarnar um Telegrafstøðina hava eisini verið samráðingar um onnur samskiftisviðurskifti á teleøkinum viðvíkjandi Føroyum, Danmark og útheimin. Hesar samráðingar hava sum úrslit, at í maj-juni 1988 varð undirskrivaður samstarvssáttmáli við heitinum »Aftale mellem Generaldirektoratet for P&T og Telefonverk Føroya Løgtings på vegna af Føroya Landsstýri om de overordnede rammer for varetagelsen af telekommunikationsopgaverne på Færøerne«.

Avtalan er skjal til hesa frágreiðing.

## Postverk Føroya

Landsstýrið hevur sett eina fyrireikingarnevnd til at fyrireika bygging av høvuðsposthúsi í Havn. Nevndin hevur fingið til uppgávu at lata landsstýrinum tilmæli í málinum: kostnað og húsarúmd o. a.

Posthúsbyggingin í Saltangará er byrjað. Útgrevsturin er um at verða liðugur, og fyrsta dagin verður støða tikin til útbjóðingartilfarið.

Posthús skal eisini byggjast á Tvøroyri, og henda bygging er sambygging við aðrar, eitt nú P/F Føroya Banka.

Eisini verður arbeitt við ætlanum um at byggja posthús í Sørvági. Kostnaðarætlan og skitsuuppskot verður gjørt í løtuni.

## Lógarmál

Í apríl 1987 setti landsstýrið nevnd at kanna møguleikan fyri at yvirtaka skipaeftirlitið. Higartil hevur nevndin hildið sjey fundir, og væntandi verður hon liðug við arbeiðið beint eftir summarfrítíðina. Landsstýrið skal tá taka støðu til, um samráðingar skulu verða við ríkismyndugleikarnar um hesa yvirtøku.

Orsøkin, til at spurningurin um yvirtøku av skipaeftirlitinum gerst átroðkandi beint nú, er tann, at ein ávís umskiping fer fram í Danmark, soleiðis at »Statens Skibstilsyn« ikki er til longur, men er lagt undir »Søfartsstyrelsen«. Annars er kannan av hesi eisini partur av samgonguskjalinum frá 1985.

Í fleiri ár hevur serliga ferðslulógarnevndin hjá landsstýrinum givið tilmælir um broytingar í ferðslulógini. Landsstýrið hevur beint nú heitt á ferðslulógarnevndina um at fara undir eina nýggja gjøgnumgongd av lógini.

Í nevndu áheitan hevur landsstýrið lagt dent á tveir spurningar. Annar spurningurin er eitt royndarkoyrikort. Hetta skulu allir bilførarar hava tvey tey fyrstu árini, og hetta koyrikortið skal hava ávísar avmarkingar í mun til tað vanliga koyrikortið.

Hin spurningurin er hámarksferðin. Her hevur landsstýrið heitt á serligu ferðslulógarnevndina um at kanna møguleikan fyri eini skipan við stigum, soleiðis at bilførarar, sum ferð eftir ferð bróta regluna um hámarksferð, skulu missa rættin at koyra akfar.

## Dálking — Umhvørvi

Umhvørvisdáling er farin at gera veruliga vart við seg seinastu árini.

Hon kennir sum kunnugt ikki landamark, og eru í seinastuni komin slík sløg av dálking uppá tal, at vit kenna eitt ávíst máttloysi.

Kortini er neyðugt, at vit fylgja so væl við sum gjørligt og ávirka í tann mun, vit megna, til tess at fyribyrgja vanlukkum, sum vit valla duga at hugsa okkum fylgjurnar av.

Her heima komu vit eitt stig longri, tá løgtingið í vár samtykti umhvørvislógina. Hetta er ein umfatandi lóg, og eftir er nú at uppbyggja umsitingina soleiðis, at tankarnir í lógini gerast veruleiki.

## Mentunarmál

Tað er eingin ivi um, at leiklistin í Føroyum hevur havt trong kor at arbeitt undir seinastu mongu árini.

Hinvegin kann ikki sigast tað sama um karmarnar um sjálva leiklistina, nevniliga tey mongu bygda- og ungdómshúsini, og sjónleikarahús, sum komin eru, síðani lógin kom í gildi í Føroyum.

Studningurin til ungdóms- og bygdahúsini er í løtuni 30% av kostnaðinum, meðan studningurin til pall, ljóð og ljós hevur verið 50%.

Nú eru so ætlanir frammi um at seta á stovn ein sjálvsognarstovn, sum fær heitið »Leikpallur Føroya«, sum skal hava til endamáls at menna leiklistina og at verða ráðgevi landsstýrisins, tá tað snýr seg um bygda- og ungdómshús, sjónleikarahús og leiklistina sum heild.

———

Landsstýrið hevur sett nevnd at virka fyri at fáa heim til lands skjøl, ið eru dýrgripir í søgu okkara og mentan okkara, og nú donsk-føroysk »arkivavtala« er gjørd, er leiðin løgd til at fara víðari, eitt nú at fara undir samráðingar við sviar um Kongsbókina.

———

Arbeiðsbólkur hevur greitt úr hondum álit um tjóðsavn í Hoyvík. Málsetningurin í álitinum er at hava slíkt savn liðugt útbygt, áðrenn henda øldin er runnin. Landsstýrið ætlar at margfalda hesa ætlan at lata tingmonnum til kunningar.

———

Tilgongdin til Fróðskaparsetur Føroya er vaksandi, og tykist tann útbúgving, her kann nemast, at standa mát við líknandi útbúgvingar uttanlands.

Samvinnan við lærdar háskúlar í grannalondum okkara hevur staðið sína roynd, og er hetta, at vit nú útbúgva okkara ungu longri part av lærutíðini heima hjá okkum sjálvum, eitt sjálvsagt samfelagsgagn.

———

Støðan viðvíkjandi hølisligu og fíggjarlig trupulleikum sjónvarpsins er lítið broytt í mun til í fjør. Tó hevur verið arbeitt við at útvega sjónvarpinum onnur høli, men er verkætlanin sera dýr.

Landsstýrið hevur givið sjónvarpinum heimild til at útvega sær eykainntøkur við lýsingum, men valla slepst undan at økja beinleiðis játtaninar komandi.

## Undirgrundin

Samgongan hevur roynt at brynja seg til enn eitt samráðingarumfar um at gera málsøkið Føroya undirgrund til sermál.

Løgmaður setti ein arbeiðsbólk at útvega okkum eyka próvtilfar og lýsa spurningin úr fólkarættarligum, ríkisrættarligum sýni og annars við atliti til møguligar avtalur, sum gerast mugu við danir áðrenn yvirtøkuna.

Nevndin hevur greitt eitt sera nágreiniligt og fevnandi álit úr hondum, og meti eg, at vit eru væl betri fyri.

Tilfarið er av slíkari náttúru, at tað ikki verður almannakunngjørt, áðrenn samráðingar hava verið.

Í fyrstu syftu verður hetta álit tí at viðgera í sjálvari samráðingarnevndini fyri afturlatnum hurðum, ið hvussu er, til vitað er, um danir eru sinnaðir at koma í veruligar samráðingar.

## Nýtt løgting

Samgongan gongur óskammað fram fyri dóm veljarans í heyst.

Vit tóku við búgvi, sum hóast sterkt í grundini — tað eru Føroyar og fólkatilfarið á hesum oyggjum — hevði stórar trupulleikar, og lata frá okkum búgv munandi styrkt og konsoliderað.

Sjálvsagt eisini við trupulleikum og nógvum vandamálum komandi, men sum ávíst frammanfyri við størri frælsi í vali av møguleikum og amboðum, serliga á búskaparliga økinum.

Tað er munin hugaligari at virka fyri at loysa trupulleikar av ov nógvum arbeiði enn at laga upp í lið, sum komin eru í, av tí at onki er fyri hendurnar.

Vit fara ikki til valið at gykla fólki »dans á rósum«, men siga hart og ærliga, at avmarkandi politikkurin, ríkin hevur verið seinastu trý árini, má fasthaldast og í ávísan mun herðast.

Vit gera greitt, at onki gildi er ókeypis, rokningin kemur so ella so, tí ber ikki til at lova skatta- ella tolllætta, og heldur ikki til at lova risavøkstur í almennum tænastuveitingum.

Lata vit breiðastu og sterkastu herðarnar bera, kann tó ein ávís umfordeiling fremjast, so ikki tyngist um hjá vanligum fólki.

Vit gykla heldur ikki, at tað ber til at fremja veruligan vinnulívspolitikk — heldur ikki sokallaðan vinnulívs vinarligan — bert við at troðka fram at landskassanum.

Hesin skal hvørki hava hol í botni ella lok, sum fýkur av, tá tað lotar úr hanakjafti.

Vónandi gevur veljarin okkum eitt løgting, soleiðis sett saman, at allir samfelagbólkar kenna seg tryggar.

Nøgdar við at teir fáa part í felagsognini, og fróar um, at hava lagt sín góða lut til tað solidariska heim, vit skapa okkum her.